# Takk

Hjartaliga takki eg øllum, sum á ymsan hátt gleddu meg á sjeyti ára føðingardegi mínum.
Tøkkin er eisini til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til at gera dagin so hugnaligan.

Gleðilig jól og eydnuberandi nýttár.

**Bestu heilsanir**
**Mathilda Abrahamsen**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum hjálptu okkum, tá ið elskaði maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og beiggi okkara

**Karl S. Jensen**

doyði og bleiv jarðaður.
Stóra tøkk til heimahjálpirnar, og heimasjúkrasystrarnar, sum vóru um hann, og vóru so góðar við hann.
Ein serstøk tøkk til Petur Hans fyri vakran sang.
Takk til øll, sum á einhvønn hátt hjálptu til við jarðarferðini og til øll, sum fylgdu honum til gravar.

**Malla, Hallbjørg, Sigrun, Haldis, Jórun, Jóhan og Kjartan v/ fam.**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Josva Anthoniussen**
Morskranes

andaðist og varð jarðaður.
Takk til tykkum á B6, sum vóru um hann ta seinastu tíðina.
Takk til Jógvan bisp fyri góð orð í kapellinum og Bøgesvang prest í kirkjuni.
Takk til sangarar, berarar og kirkjutænarar. Takk fyri kransar, blómur og peningagávur til Selatraðar kirkju.
Takk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Petra og børnini við familju**

**Dagurin**
**17. desember. Albina**, deyð umleið ár 250. Ung kvinna, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## 80 ára føðingardagur
Mikudagin 17. desember verður Alisa Mørkøre, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í heiminum.

## 80 ára føðingardagur
Mikudagin 17. desember verður Malan (Mella) Hansen, ættað úr Funningsfirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Æðuvík hjá Katrinu og Osmund.

## 75 ára føðingardagur
Mikudagin 17. des. verður Ingibjørg Debes, Oyri 75 ár. Føðingardagurin verður hildin saman við børnunum.

## 60 ára føðingardagur
5. januar verður Mortan Johannesen (Mortan hjá Hans Paula) 60 ár, dagurin verður hildin leygardagin 3. januar, kl. 19.00, í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøtu 9. Tey í vilja gleða hann við at koma, kunnu boða frá við at ringja á 21 12 97 - Magni, ella 31 41 65 - Elisabeth, ella senda t-post: magni@mjsalt.fo, innan 19. desember.

## 60 ára føðingardagur
Nýggjársaftan verður Snorri Fjallsbak 60 ár. Veitsla verður í HB-húsinum tann 10. januar kl. 19. Tey, ið fara at gleða Snorra við at koma, verða biðin um at siga frá innan 4. januar. Teldupost snorri@kallnet.fo, tlf. 317074 ella 584964 (sms).

## 65 ára føðingardagur
8. januar verður Niels Við Gjógvará (Niels í Skorti) 65 ár. Dagurin verður hildin í Framtíðini leygardagin 10. Januar kl. 19.00. Tað hevði glett meg at sæð familju, vinir og kenningar í føðingardegi. Tey, ið ætla at koma, verða vinarliga biðin um at boða frá á telef. 373280-508515-373112-373726 innan 2. januar.

## Brúdleyp
Leygardagin 20. desembur giftast Brynhild Asbjarnardóttir Lómaklett og Fróði Jacobsen. Bæði úr Klaksvík. Vígslan verður í Christianskirkjuni kl.16.00. Veitslan verður fyri innbodnum kl.19.00 í Skálanum í Klaksvík.



## Brúdleyp
Leygardagin 3. jan. 2009 giftast Eva S. Lilaa Saltangará og John F. Danielsen Strendur. Víglsan verður í Kelduni kl. 12.00. Aftaná vígsluna verður reseptión har øll eru hjartaliga vælkomin. Kl. 18.00 verður døgurði fyri innbodnum í bygdarhúsinum á Strondum.

## Brúdleyp
Leygardagin 27. desember kl.16 giftast í Hoyvíkar Kirkju Jónfríð Jóanesarson og Hans Olivur Højgaard Joensen. Vit hava opið hús á Studentaskúlanum í Hoydølum frá kl. 19.30. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 20. desembur á tlf. 423285, 422159, 270597 ella á t-post til: hansolivurj@skulin.fo


# Avgreiðslutíðir um jólini

Frá 29. desember 2008 til og við 2. januar 2009 eru avgreiðslutíðir okkara broyttar soleiðis:

Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar frá kl. 10 til kl. 12.

Frá mánadegnum 5. januar 2009 verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 10.00 til 15.00 uttan fríggjadag, tá opið er frá kl. 10.00 til 13.00.

Sí annars www.almannastovan.fo



*Almannastovan ynskir viðskiftafólki sínum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.*

almannastovan

KREA

Tórshavn · Smyrilsvegur 20, Postrúm 3096 · 110 Tórshavn, Tel 35 35 10 · Faks 35 35 11
Norðoyggjar · Klaksvíksvegur 78A, Postrúm 296 · 700 Klaksvík, Tel 45 72 40 · Faks 45 72 41
Eysturoy · Heiðavegur, Postrúm 224 · 600 Saltangará, Tel 47 47 10 · Faks 47 47 11
Suðuroy, Postrúm 58 · 800 Tvøroyri, Tel 35 35 60 · Faks 35 35 61